

# FRÁGREIÐING FYRI 2015

KRINGVARP FØROYA

# Public Service
# frágreiðing fyri 2015

Avrit frá kvf.fo

**5. frágreiðingin um virksemið hjá**
**Kringvarpi Føroya**

*Ritstjóri: Jóhann Mortensen*
*Sett upp: Regin Davidsen*

## Innihald:

Formæli ..... 4
Public Service í tímum ..... 5
Fíggjarliga nýtslan ..... 6
Aktuelt ..... 9
Mentan ..... 12
Tónleikur ..... 14
Infotainment ..... 15
Børn og ung ..... 16
Átrúnaður ..... 18
Ítróttur ..... 19
Annað virksemi og skyldur hjá Kringvarpinum ..... 20
Byggja uppí í Sortudíki ..... 23
Málslig ráðgeving ..... 24
Samskifti við borgaran ..... 25
Alnets tænastur ..... 26
Keypa tænastur ..... 27
Bygnaðurin ..... 29
Roknskapur ..... 30

Avrit frá kvf.fo

# Hendingaríkt ár

2015 var eitt hendingaríkt ár hjá Kringvarpi Føroya.

Bæði fólkatings- og løgtingsval vóru á skránni í fjør. Valini eru kostnaðarmikil og krevja nógva orku. Vit valdu at gera nógv burtur úr serliga valstríðnum undan løgtingsvalinum og valkvøldinum sjálvum – hetta, sum ein týðandi liður í fólkaræðiligu tilgongdini.

Nýggja barnaheimasíðan VIT sá eisini dagsins ljós. Við hesum ynskir Kringvarp Føroya at seta sjøtul á at skapa børnunum ein talgildan føroyskan alheim. Arbeitt verður áhaldandi at menna barnaheimasíðuna, so at børnini kenna seg aftur í tilfari á føroyskum.

2015 var eisini árið, tá vit í nógv størri mun enn áður fóru at stroyma á netinum frá ymiskum tiltøkum. Stóra spurnarkappingin fyri børn, Orrustan, var á skránni í sjónvarpinum. Somuleiðis høvdu sjónvarpshyggjarar høvi at síggja satirisku sendirøðina Føroyaportalin.

Í fjør endaðu stjóri, leiðarin og ein journalistur á Aktuelt á ákærubonkinum í sonevnda tollmálinum, tí Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, stevndi fyri ærumeiðing. Eystari Landsrættur fríkendi Kringvarp Føroya fyri revsing og endurgjald, tí sannleikaprógv vórðu førd í páhaldinum. Dómurin er endaligur, tí málið sleppur ikki í Hægsta rætt.

Eftir umfevnandi sparingar og uppsagnir við ársskiftið 2012, hevur fíggjarliga gongdin í Kringvarpi Føroya verið rættiliga støðug. Í fjør var rakstraræltlanin 57,5 mió.kr., men inntøkurnar vórðu hægri enn ætlað. Tað gav rúm fyri meira virksemi, og útreiðslurnar vórðu tilsamans 57,9 mió.kr. Harumframt vórðu brúktar aðrar 2,3 mió. kr. av savnaðum spæliinntøkum. Upphæddin varð nýtt til ávíst virksemi, sum stýrið og leiðsla árið frammanundan høvdu lagt ætlanir um. Seinast í frágreiðingini síggjast roknskapartølini fyri 2015.

Kringvarp Føroya hevur framvegis avbjóðingar á fíggjarliga økinum, tí tøkni- og sendiútgerðin er sera kostnaðarmikil, og stovnurin er tøkniliga tungur at reka. Tørvurin á dátagoymslum er eisini ovurstórur, og serliga sjónvarpsparturin krevur nógvan goymlsu- og netkapasitet. Nú ætlanin er at senda sjónvarp í HD-góðsku, verður tørvurin nakað væl størri.

Kringvarp Føroya eigur eftir míni sannføring at vera felags miðlapallur hjá føroyingum. Hetta krevur, at vit fáa meira tilfar á heimasíðuna, og at tilfarið verður lættari atkomuligt hjá brúkarunum. Arbeitt verður við hesum. Næsta stig verður so í størri mun at røkka sosialu miðlarnar, tí skulu vit verða savnandi miðlaeindin, mugu vit verða til staðar við tilfari, har fólk vænta, at vit eru.

Seinasti public service-sáttmálin millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið fór úr gildi 31. desember 2013. Avtalað er millum MMR og KvF, at uppskot til nýggjan public service sáttmála skal gerast á heysti í 2016 og setast í gildi 1. januar 2017.

*Í Sortudíki á summarmála í 2016*
*Dia Midjord, stjóri í Kringvarpi Føroya*

Avrit frá kvf.fo



# Public Service tímar

| Bólkar | Útvarp | Sjónvarp | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Tíðindi | 465 | 193 | 658 |
| Tónleikur | 3873 | 19 | 3892 |
| Infotainment | 759 | 39 | 798 |
| Børn og ung | 102 | 176 | 278 |
| Átrúnaður | 207 | 70 | 277 |
| Mentan | 415 | 100 | 515 |
| Ítróttur | 148 | 69 | 217 |
| | **5969** | **666** | **6635** |

*Endursendingar eru ikki við í tølunum.*







## *Bólkarnir fevna um hesar sendingar:*

**Tíðindi:** Útvarpstíðindi, Dagur og Vika, Radarin, D&V-kjak og dokumentarsendingar mánakvøld.

**Tónleikur:** Allar tónleikasendingar í útvarpi og sjónvarpi, FMA, konsertir og náttarrásin

**Infotainment:** Orðið er heitið fyri sendingar, sum fella undir "information" og "entertainment". Hesar sendingar eru undir bólkinum Infotainment: Morgunsendingin, GMF, sendingin Vikuskiftið, Surk, ólavsøkuprát, Føroyaportalurin í sjónvarpi, summargestir o.l.

**Børn og ung:** Barnaútvarpið og allar barnasendingar í sjónvarpi, bæði føroyskar og týddar.

**Átrúnaður:** Morgunlestrar, andaktir, guðstænstur, møti og sendingin Credo

**Mentan:** Mentanarsendingar, siðsøga (Meg Minnist), samrøður, frásagnir (Við Tórða á túri o.l.), náttúrusendingar, dokumentarsendingar hóskvøld, framhaldssøgur, stuttsøgur, tónleikasendingar við samrøðum (Brunsj), ymsar sendingar um høgtíðir o.l.

**Ítróttur:** Ítróttasendingin í útvarpinum í vikuskiftunum, 3-2 í sjónvarpinum, frásagnir frá fótbolti og handbolti, finalur í handbolti, flogbolti, fótbolti, svimjing, badminton, borðtennis og judo, landsdystir í fótbolti og onnur føroysk luttøka í altjóða kappingum.

### *Sendingar, sum fella uttan fyri bólkingina:*

Valsendingar o.a. politiskt tilfar í sjónvarpi og útvarpi: 58 tímar

Avrit frá kvf.fo

# Meira enn helvtin fer til tíðindi og sendingar







## Kringvarp Føroya í tølum

Framleiðslan ella beinleiðis útreiðslurnar hjá Kringvarpi Føroya í 2015 vórðu 33,2 mió. kr. Hetta er kostnaðurin at reka deildirnar; Aktuelt, Mentan og ein part av deildini Tøkni.

Óbeinleiðis útreiðslurnar í 2015 vórðu 27 mió. kr. Hetta er kostnaðurin at reka umsitingina, hin partin av deildini Tøkni, rættindi, íløgur og rentur & avskrivingar. Hvussu útreiðslurnar eru býttar, sæst í talvuni niðanfyri.

**Beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur**

| Upphæddir í kr. | Beinleiðis | Óbeinleiðis |
|---|---|---|
| Aktuelt | 11.012.460 | |
| Heimasíðan | 1.023.744 | |
| Mentan | 11.678.898 | |
| Tøkni | 9.509.044 | 11.588.667 |
| Fyrisiting | | 7.356.854 |
| Rættindi | | 4.005.986 |
| Íløgur | | 3.367.134 |
| Rentur og avskrivingar | | 695.478 |
| **Samanlagt** | **33.224.146** | **27.014.119** |

Talvan vísir, at deildin Tøkni fevnir bæði um beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur. Á deildini eru fólk í beinleiðis hava við framleiðslu at gera, sum eitt nú fotografar, og fólk, sum ikki hava nakað við framleiðslu at gera, eitt nú KT-fólk, húsavørður o.a. Men hesi fólk hjálpa ofta til við ymiskum sendingum, so óbeinleiðis útreiðslur eru ikki allar óbeinleiðis.

Fyri nøkrum árum síðani var meira javnvág ímillum beinleiðis- og óbeinleiðis útreiðslur, men seinnu árini er meira peningur nýttir til public service tilfar á ymsu miðlapallunum og minni er brúkt til óbeinleiðis útreiðslur. Í 2015 er munurin seks mió. kr. Strikumyndin niðanfyri vísir býtið í prosentum.

**Beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur 2015**




Avrit frá kvf.fo

## Beinleiðis útreiðslur

Beinleiðis útreiðslurnar hjá Kringvarpi Føroya eru útreiðslur, stovnurin brúkar til at gera public service tilfar til miðlapallarnar; útvarp, sjónvarp og heimasíðu. Býtið ímillum ymsu deildirnar, sæst í talvuni til høgru

Talvan vísir, at Aktuelt, sum umfatar allar tíðindasendingar í KvF, allar aktueltsendingar og morgunsendingina í útvarpinum, brúkar 11 mió. kr. av beinleiðis útreiðslunum. Hetta svarar til ein triðing. Heimasíðan hoyrir til deildina, og hon kostar eina mió. kr.

| Beinleiðis útreiðslur | | | |
|---|---|---|---|
| | Deild | kr. | kr. |
| 5.2.1 | Aktuelt/GMF | | 11.012.460 |
| 5.2.1.1 | Heimasíðan | | 1.023.744 |
| 5.2.2 | Mentan: | | |
| 5.2.2 | - Mentan | 6.512.463 | |
| 5.2.3 | - Átrúnaður | 682.251 | |
| 5.2.4 | - Ítróttur | 1.071.369 | |
| 5.2.5 | - Børn og Ung | 2.943.309 | |
| 5.2.6 | - Tónleikur | 469.506 | 11.678.898 |
| | Tøkni framl. | | 9.509.044 |
| | Beinleiðis útreiðslur | | **33.224.146** |
| | Óbeinleiðis útreiðslur | | 27.014.119 |
| | **Samanlagt KvF** | | **60.238.265** |

Mentan, sum umfatar at kalla allar aðrar sendingar í KvF, brúkar 11,6 mió. kr. av beinleiðis útreiðslunum. Hetta svarar til 35 prosent. Sum sæst í talvuni er Mentan í samsvari við public service sáttmálan býtt sundur í øki, har eitt nú kostnaðurin til “Børn og Ung” er 3 mió. kr.

Á Tøknideildini eru fleiri fólk, eitt nú fotografar og sendifólk, sum eru við í beinleiðis framleiðslu. Tøkniliga framleiðslan er 9,5 mió. kr. og tað svarar til 29%.

Strikumyndin til høgru vísir býtið í prosentum.




Avrit frá kvf.fo

## Óbeinleiðis útreiðslur

Óbeinleiðis útreiðslurnar í 2015 vórðu 27 mió. kr. Hetta er kostnaðurin at reka fyrisitingina, partin av deildini Tøkni, sum ikki hevur beinleiðis við framleiðslu at gera, útreiðslur til rættindi, íløgur og rentur & avskrivingar.

Talvan til høgru vísir, hvussu óbeinleiðis útreiðslurnar hjá Kringvarpi Føroya eru býttar sundur á ymsu økini.

Talvan vísir, at samanlagt verða 27 mió. kr. brúktar til óbeinleiðis útreiðslur. Býtið í prosentum sæst í strikumyndini niðanfyri.

| Óbeinleiðis útreiðslur | | |
|---|---|---|
| **Upphæddir í kr.** | kr. | kr. |
| Fyrisiting, lønarpartur | 4.797.981 | |
| Vørur og tænastur | 2.558.873 | 7.356.854 |
| Tøkni, lønarpartur ikki framleiðsla | 4.715.848 | |
| KT, húsakostnaður, akfør, samskifti o.a. | 6.872.819 | 11.588.667 |
| Rættindi ísv tónleik, upplestur og sendingar | | 4.005.986 |
| Íløgur, leiga og viðlíkahald | | 3.367.134 |
| Avskrivingar, skuldarar | | 695.478 |
| Óbeinleiðis útreiðslur | | **27.014.119** |
| Beinleiðis útreiðslur | | 33.224.146 |
| **Samanlagt KvF** | | **60.238.265** |



## Væntað framleiðsla í 2016

Kringvarpið hevur spakuliga økt um virksemi sítt í 2014 og 2015, har serliga økini "Aktuelt" og "Barna & Ungdómsøkið" eru uppraðfest, sum KvF-stýrið hevur ynskt. Sjónvarpstíðindini fara ikki longur í summardvala, men eru á skránni alt árið, tó tvær ferðir um vikuna eitt stutt tíðarskeið um summarið, tá flestu starvsfólkini eru í feriu. Mett verður, at framleiðslan í 2016 verður á sama støðið sum í fjør.

Løgtingið hevur samtykt at broyta fíggjarliga grundarlagið hjá Kringvarpi Føroya. Nýggj innkrevjingarskipan er sett í verk, har kringvarpsgjaldið verður kravt mánaðarliga inn um skattin, og Gjaldstovan stendur fyri arbeiðnum. Somuleiðis hevur myndugleikin ásett, at Kringvarp Føroya kann hava lýsingar, men at hesin peningur skal í landskassan.

Broytingarnar vórðu settar í gildi á nýggjárinum, og tá árið er liðugt, vita vit neyvari, hvat úrslit umleggingin samanlagt gevur Kringvarpi Føroya. Samlaði fíggjarkarmurin verður helst nakrar milliónir krónur hægri og fer at liggja um einar 63 mió. kr.

Kringvarp Føroya hevur fingið ein nýggjan framleiðslubygning, sum kortini ikki kann brúkast enn. Bygningurin er latin uttan útgerð og innbúgv. Talan er um ein bygning, sum skal bera alt KT-undirstøðukervið, so har mugu vit nýta nakrar mió. kr., áðrenn bygningurin kann takast í brúk. Kringvarp Føroya hevur eisini gjørt av at uppstiga helvtina av upptøkutólunum frá ST til HD góðsku. Íløgan er samanlagt 1,5 mió. kr.

Av hesum ávum verður munandi meira peningur brúktur til óbeinleiðis útreiðslur í ár og næsta ár.

Avrit frá kvf.fo





# Valárið 2015 setti sín dám á arbeiðið á Aktuelt

Fólkatingsval og løgtingsval settu sín serliga dám á 2015, tí valini vóru tey mest krevjandi arbeiðini í árinum. Vit fóru longu at fyrireika valini á heysti í 2014. Valgrafikkur varð keyptur frá Danmarks Radio og valsendingar vórðu lagdar tilrættis.

## Gjørdu nógv burtur úr fólkatingsvalinum

Í juni var fólkatingval og bæði útvarp og sjónvarp gjørdu nógv burturúr. Allir politisku flokkarnir og uttanflokkaumboð vóru í Andgletti í sjónvarpinum og síðani á Vágskálini í útvarpinum. Eisini varð skipað fyri formansumfari og vit sendu beinleiðis kjak í útvarpinum úr Keypmannahavn.

## 20 valevni fyri hvønn flokk

Hóast vit gjørdu nógv burtur úr fólkatingsvalinum, so valdu vit at raðfesta løgtingsvalið hægri, og brúktu tí meira orku og pening til tað. Í sambandi við løgtingvalið vóru allir miðlarnir hjá Kringvarpinum á ferð kring landið. Nógvir kjakfundir vóru í sjónvarpinum og í útvarpinum og meira skeivt valtilfar varð gjørt til heimasíðuna og sosialu miðlarnar. Ein magasinsending varð gjørd til Dag og Viku, sum fór aftur um størstu evnini í valstríðnum.

Ungdómsportalurin hjá Kringvaprinum, Røddin, gjørdi valtilfar til yngra ættarliðið, og barnaútvarpið greiddi frá fólkaræði í barnahædd.

Allir flokkar vóru í Andgletti í útvarpinum og vigaðir á Vágskálini. Somuleiðis vóru allir floksformenn í sjónvarpsstovuni, og politiskir viðmerkjarar í sjónvarpsstovuni eina ferð um vikuna.

Kringvarp Føroya legði seg eftir, at so mong uppstillað sum gjørligt sluppu framat við sínum sjónarmiðum á miðlapallunum hjá Kringvarpinum. Pláss var tilsamans fyri fleiri enn 20 umboðum úr hvørjum flokki í sendingunum hjá Kringvarpinum.

## Valkvøldið er nú eitt sjónvarpskvøld

Samanborið við undanfarin val valdu vit at gera mun á valsendingunum í útvarpi og sjónvarpi valkvøldini. Fyrr hevur eins nógv orka verið løgd í báðar miðlarnar, men royndirnar siga okkum, at valkvøld eru sjónvarpskvøld burturav. Tað sæst eisini í londunum rundan um okkum. Til fólkatingsvalið høvdu vit bjóðað flokkunum í Kringvarpshøllina at fylgja uppteljingini og vit høvdu reportarar beinleiðis kring landið. Í útvarpinum vóru valúrslitini lisin og gestir komu á gátt.

Arbeiðið í sambandi við løgtingsvalið var væl størri, og meira varð gjørt burtur úr útvarpssendingini valkvøldið. Málið var, at sendingin í útvarpinum skuldi skilja seg burturúr. Hon var meira skeiv og speisk, samstundis sum sendingin í sjónvarpinum var meira hátíðarlig og álvarslig. Somuleiðis løgdu vit okkum eftir at hava øll úrslit á heimasíðuni hjá kringvarpinum, so skjótt sum tey vóru tøk frá valstøðunum. Eisini vórðu stytri sjónbond gjørd til heimasíðuna. Hesi fóru afturum størru sjónvarpssendingarnar. Skeivir vinklar vórðu lagdir á heimasíðuna, eins og skjótar dagføringar frá journalistunum, sum vóru kring landið.

Vit høvdu sett okkum fyri, at valdagurin var ein veitsludagur fyri fólkaræðinum, og at hetta skuldi seta sín dám á alt, sum varð gjørt í kringvarpinum valkvøldið. Og tað eydnaðist.

Avrit frá kvf.fo

## Kringvarpið og størri valluttøka

Kringvarpið hevði eisini sína egnu valsskrá, sum var at økja um fólkaræðiligu luttøkuna hjá føroyingum. Hetta skuldi síggjast aftur í valluttøkuni til bæði fólkatingsvalið og løgtingsvalið. Vit eru errin og kunnu staðfesta, at vallutøkan til bæði valini var væl hægri enn til undanfarin val. Valluttøkan til løgtingsvalið í 2015 var 88,8% samanborið við 86,6% í 2011. Valluttøkan til fólkatingsvalið í 2015 var 65,6% samanborið við 58,9 í 2011. Somuleiðis fegnast vit um, at fleiri útisetar greiddu atkvøðu til løgtingsvalið enn nakrantíð áður.

## Altjóða yvirgangur – kvf-fólk til París




2015 er árið, tá yvirgangurin kom til Europa og tað merkti eisini tíðindaflutngin in í kringvarpinum. Í januar var franska avísin, Charlie Hebdo, álopin. Kringvarpið hevði fólk á staðnum. Í februar var yvirgangsatsókn eisini í Keypmannahavn. Eisini tá var Kringvarpið á staðnum. Í november var aftur yvirgangurin í franska høvuðsstaðnum og kringvarpið sendi fyri aðru ferð í sama ári starvsfólk til París at siga frá yvirganginum og avleiðingunum.

## Avdúkandi dokumentarsendingar

Aktuelt hevur seinastu árini lagt seg eftir at gera longri kritiskar dokumentarsendingar. Hesar hava allar sett dagsskrá. 2015 var onki undantak. Árið byrjaði við trimum sendingum um riknu fiskivinnuna í Føroyum. Í trimum sendingum fóru vit afturum og viðgjørdu fiskivinnupolitikkin. Í sambandi við fiskivinnusendingarnar varð skipað fyri kjakið og samrøðum í sjónvarpsstovuni. Valini settu dám á summarhálvuna, men í desember var aftur ein kritisk sending setta á skrá, Heðin og Havnin.

Í sambandi við yvirgangin í París í januar gjørdu vit eina beinleiðis sjónvarpssending í sjónvarpsstovuni. Somuleiðis høvdu vit sendingar í sambandi við fíggjarkarmarnar, ið vóru lagdir fram á vári 2015.

## Kavaódn og tilbúgving

Fleiri stakar sendingar eru gjørdar til útvarpið í 2015. Ógvusligt kavaveður tíðliga í 2015 elvdi til, at tilbúgving skuldi setast í verk. Í tí sambandi sendi útvarpið beinleiðis fleiri kvøld.

Kringvarpið hevur eisini skipað fyri kjakfundum í Klaksvík í sambandi við torradagarnar, sum eru sendir beinleiðis í útvarpinum. Harafturat koma fleiri tíðindafundir og serlig tiltøk, sum eru send beinleiðis í útvarpinum.

## Øll tíðindini koma á kvf.fo

Mestsum øll tíðindi verða gjørd til útvarp, sjónvarp og web. Tad vil siga, at øll tíðindi, sum verða gjørd til annaðhvørt útvarpstíðindini, Dag og Viku ella Góðan Morgun Føroyar, verða eisini løgd á heimasíðuna hjá kringvarpinum.

Harafturat eru allar útvarps- og sjónvarpssendingar tøkar á heimasíðuni. Sumt verður gjørt burturav til heimasíðuna og sosialu miðarnar. Til dømis verða tíðindafundir ofta stroymaðir beinleiðis á heimasíðuni, og móttøkan fyri nýggja landsstýrinum í september 2015 var somuleiðis stroymað beinleiðis á heimasíðuni. Eisini er satira og skemt gjørt til heimasíðuna og sosialu miðlarnar í sambandi við løgtingsvalið.

## Aktuelt gloymir ikki mentanina

Hóast Aktueltdeildin mestsum fæst við tíðindaflutning burturav, so virðismeta vit mentan og ynskja at økja tilvitskuna um føroysku mentanina í aktuellu sendingunum. Mentan er fastur táttur í Degi og Viku, sum er einasta regluliga sjónvarpssending í Kringvarpinum. Vit leggja okkum eftir at hava eina mentanarrundferð hvørja viku, at kjakast um mentan og viðgera mentanarpolitikkin í landinum. Somuleiðis ynskja vit at kveikja mentanina.

Avrit frá kvf



## GMF slóðaði fyri kóri

Góðan Morgun Føroyar tók tí tíðliga í 2015 stig til at skipa eitt morgunkór. Morgunkórið er mannað við óroyndum sangarum, sum í felag hava hug at syngja í kóri. Morgunkórið hevði sína fyrstu almennu framførslu í kringvarpinum mentanarnáttina hjá Tórshavnar kommunu í juni. Tá slepti Góðan morgun Føroyar eisini endanum á kórinum, men kórið livir framvegis og hevur síðani havt framførslur um alt landið. Nógvir sangarar eru sprotnir úr hesum kóri.

GÓÐAN MORGUN FØROYAR

Eisini eru morgunsendingarnar hjá Aktuelt karmur um nógvar tónleikaframførslur hjá bæði royndum og óroyndum føroyskum tónleikarum.

Morgunsendingarnar á Aktuelt hava eisini havt fokus á myndalist og ljósmyndalist. Skipað hevur verið fyri kappingum av ymsum slagi og vinnaramyndirnar hava allar verið sýndar fram í kringvarpinum í sambandi við mentanarnáttina. Nógvar av myndunum prýða framvegis í kringvarpshúsinum.

Avrit frá kvf.fo




## Satira á Aktuelt

Álopið á satirublaðið Charlie Hebdo var eitt álop á talufrælsið. Vit hava tí lagt okkum eftir at hava meira satiru á Aktuelt seinasta árið. Hetta sæst serliga aftur í morgunsendingini Góðan Morgun Føroyar, sum hvønn morgun vendir tíðindaflutningin á høvdið í einum speiskum tóna. Somuleiðis hava vit havt nógvar klummur og fríggjadagsprik, bæði í Góðan Morgun Føroyar og í sendingini Summarmorgun.

## Rættarmál

Tað ávirkaði 2015, at bæði leiðarin á Aktuelt og ein journalistur á deildini vórðu stevnd fyri ærumeiðing í Tollmálinum. Fyrst í árinum vóru kringvarpsfólkini dømd í Føroya Rætti, men í november vóru tey fríkend í Landsrættinum.

Mentan

# Longd mentakafé, herseting og Tórður túrast

Kringvarp Føroya er fremst mentanarberi í Føroyum. Og mentan er tí eitt kjarnuøki í kringvarpinum, bæði í útvarpi og í sjónvarpi.

## Longd mentanarcafé

Innan mentanarøkið hendu týðandi broytingar í 2015. Størsta varandi broytingin var, at Mentanarkafé´in í útvarpinum varð longd við einum tíma um vikuna. Tí broyttu vit skránna, soleiðis at Mentanarkaféin nú verður send mikukvøld millum kl.19 og 21. Longd senditíð gav møguleika fyri at umrøða og viðgera tilfarið djúpri og betur. Vit hava lagt okkum eftir at fáa fleiri ummæli, tí ummælini birta upp undir ta framhaldandi samrøðuna millum listafólkið, verkið og brúkaran.

## Sólarmyrking økti virksemið

Í marsmánaði var sólarmyrkingin og hon setti dám á alla sendiflatuna. Vit sendu beinleiðis sjónvarp 20 mars, umframt at vit nakað seinni gjørdu eina sjónvarpssending, sum tók samanum. Eisini í úvarpinum setti sólarmyrkingin dám á, bæði uppundir og og á sjálvum degnum í fleiri sendingum.

## Herseting í arkitektoniskum og søguligum ljósi

Í fjør vóru 75 ár síðani, at Bretland hersetti Føroyar, og 70 ár vóru liðin síðani seinni veraldarbardagi endaði. Tí sendu vit á sumri í 2015 væl umtóktu røðina ”Operatión Krígsminni” í útvarpinum. Í sendingunum vitjaði útvarpsmaður saman við einum arkitekti og staðkendum fólkum ymisk støð kring landið, sum høvdu samband við hersetingina.





## Tórður túrast og Meg Minnist

Mentanarøkið fevnir eisini um siðsøgu, og sendingar sum Við Tórði á túri. Í teimum siðsøguligu samrøðunum í Meg Minnist verður dentur lagdur á ta fólksligu frásøgninina, eins og ymiskt verður lagt aftrat søgu okkara við frásagnum um hendingar á landi og á sjógvi. Í sendingunum Við Tórði túri verður pulsurin afturímóti tikin av dagliga lívinum í bygdum, býlingum ella øðrum støðum kring landið og uttanlands.

Avrit frá kvf.fo

## Føroysk filmslist

Kringvarpið setti í 2015 eisini fokus á føroyskan film. Á ársins stytsta degi varð ein kavalkada við føroyskum filmum víst í sjónvarpinum. KvF tók við hesum upp ein tátt, sum eisini er kendur úr øðrum londum. Í hesum sambandi varð filmskjak millum filmsfólk og landsstýriskvinnuna í mentamálum eisini at síggja í sjónvarpinum.

## Svartgull og Spískamarið

Kringvarp Føroya keypti eisini í 2015 sjónvarpstilfar, sum í breiðari merking mynda føroyska mentan. T.d. vórðu dokumentarfilmarnir Svarta koli um føroysku kolasøguna vístir á jólum, eins og dokumentarsendingin at røkka niðan á Mount Everest.




Væl umtókta sendirøðin ”Spískamarið” var eisini at síggja í sjónvarpinum í 2015. Talan var um seks sendingar tilsamans hetta árið, sum Kringvarpið keypti frá Spískamarinum.

Eisini keypti kringvarpið tvær sendingar við heitinum Eysturhjálpinhjálpin, um hjálpararbeiði í Rumenia og Moldova.

Til útvarpið keyptu vit sendingarnar: “Til Lindu”, um tónleikaran Rasmus Rasmussen, “Úr írskari armóð í Hvítu Húsini”, í tveimum pørtum og ferðafrásøgnina “Langferð í eini yvirgangs- og sjórnænaratíð”.

## Ólavsøkan ein maratonsending

Størsta vaktarsetingin í 2015 var á ólavsøku, tá oman fyri 70 fólk vóru á vakt. Kringvarpið sendir nógvar tímar frá tjóðarhátíð føroyinga. Í útvarpinum senda vit frá ólavsøkuaftansmorgni tíðliga til miðnáttarasangin ólavsøkunátt. Og í sjónvarpinum frá tí at ólavsøkan varð sett til ólavsøkukvøld. Tilsamans 32 tímar í útvarpi og stívliga fýra tímar í sjónvarpinum.

## Á Quiztinum royna fólk sína vitan

Spurnarkappingin Á Quiztinum varð tikin upp aftur í 2014, og varð aftur send vetrarhálvuna 2015-16. Á Quiztinum hevur nú 10 ár á baki og er sera vælumtókt sending. Tilsamans kappast 32 fólk, ella 15 pør, um, hvusu væl tey vita ella minnast. Kappingin er skipað er cup-skipanini og tilsamans eru 15 umfør. Í 2015 var finalan í Løkshøll í Runavík. Tilsamans 300 fólk fylgdu spennandi finaluni í Løkshøll. Tað er stórt arbeiði at savna spurningar, tí talan er um nógvar ymiskar spurningar.

Avrit frá kvf.f

## Gamlaárskvøld í Norðurlandahúsinum



Tað síðsta “krútið” í Kringvarpi Føroya varð, sum vituligt er, goymt til nýggjársaftan.

Aftur í 2015 skipaði kringvarpið fyri eini fjølbroyttari, undirhaldandi, spennandi og áhugaverdari sending gamlaárskvøld úr Norðurlandahúsinum.

Á skránni var undirhald, samrøður, tónleikur og so varð róð aftur á hendingar í 2015.

Eitt nú tosaðu vit um tað, sum føroya fólk tókust við í 2015, so sum sólarmyrking. Um tey megnaðu at halda nýggjárslyftið, so um at klænka seg. Vit prátaðu við mest umtalaða politikkaran í 2015, Anniku Olsen, við Guðrið Højgaard um ferðavinnuna í 2015, og vit vóru í Suðuroy, har vit millum annað vitjaðu Palshøll.

Døgg Nónsgjógv, Hallur Joensen og Jógvan Joensen (X-factor) spældu í studio.

Talan var um tríggjar tímar við goðum, hugnaligum nýggjárstilfari.

# 43 prosent er føroyskur tónleikur

Tónleikur fyllir nógv í senditíðini í útvarpinum. Sambært uppgerð frá sendiskipanini spældi útvarpið 78802 sangir í 2015. Av hesum vóru 34012 sangir føroyskir. Tað merkir, at 43 prosent av tónleikinum eru føroyskir sangir.

Høvuðsorsøkin til vøksturin liggur í summarskránni hjá útvarpinum, sum hvønn dag spældi nógv fleiri tímar við fjøllbroyttum føroyskum tónleiki enn undanfarin ár, men eisini aðrar sendingar, t.d. Góðan Morgun Føroyar, hava spælt meira nýggjan føroyskan tónleik.

Nýggjar tónleikasendingar, ið komu á skránna eftir summarsteðgin í 2015, vórðu Harmonikuløtan, Ragnarrock og ummælarasendingin Kvørnin.

Kvørnin

Tónleikaráðið í kringvarpinum fekk eftir summarsteðgin tveir nýggjar kvinnuligar limir, Elina Michelsen og Rannvá Fossaberg. Tær manna saman við Rúna Jákupsson, Ragnari A Jacobsen, Una L. Hansen, Rólant Waag Dam og Eyðfinni Jensen tónleikaráðið. Tónleikaráðið velur tónleikin, sum eftir ávísum títtleika verður spældur í ymiskum umførum í tónleikaumfarinum

Sum nakað nýtt í sjónarpinum stroymaðu vit finaluna í tónleikakappingini “Sement” á Reinsarínum í Havn, og fimm konsertir vórðu tiknar upp á nýggja, føroyska tónleikafestivalinum “Við Múrin”. Í báðum førum varð talan um framleiðslur, ið vórðu keyptar uttan fyri stovnin (Raaclip).

Eisini gjørdu Kringvarp Føroya í 2015 tvær sjónvarpsupptøkur við Føroya Symfoniorkestri, bæði Nýggjárskonsertina og Heystkonsertina. At Heystkonsertin varð tikin upp til sjónvarp, gav tvær sendingar afturat. Fyri at skapa størri fjølbroytni tóku vit eisini upp ”Summar Jazz”, sum kom afturat á skránna hjá útvarpinum.

Avrit frá kvf.fo

# Ragnar fekk norðurlendska virðisløn




Næstan á hvørjum ári fáa starvsfólk í kringvarpinum eina virðisløn. Í fjør fekk Ragnar A. Jacobsen Norrøna Herðaklappið fyri sendingina Norðurljóð, sum bara hevur norðurlendskan tónleik.

Ragnar fekk heiðurslønina handaða í samband við Norðurlandadagin 23. mars í fjør. Í grundgevingini fyri at lata Ragnari heiðurslønina verður sagt:

“Vit í Norrøna Felagnum fegnast stórliga um, at tú gert títt til at gera vart við norðurlendska tónleikin í útvarpinum. Við sendingini Norðurljóð ert tú við til at økja um kunnleikan til norðurlendska mentan, og tú prógvar í hvørjari sending, at norðurlendskur tónleikur er annað enn Vikingarna og Shu-Bi-Dua.
Norrøna Felagið nýtti norðurlandadagin 23. mars til at handa Norrøna Herðaklappið á fyrsta sinni. Ætlanin hjá felagnum er at heiðra einum persóni, sum ger nakað serligt fyri at økja um kunnleikan til Norðurlond og skapa samband og vinarlag millum londini. “

Fyrsta Norðurljóð varð sent í 2013 og eru áleið 150 sendingar við norðurlenskum tónleiki gjørdar síðani tá. Umframt Norðurljóð ger Ragnar eisini sendingina Ragnarokk. Harafturat er hann tøkningur og er í ítróttarredaksjónini saman við Leivi Frederiksen.

# GMF, Also, Surk og Vikuskifti

## Kunning og undirhald

Eitt nýtt hugtak fekk pláss í public service-frágreiðingini í 2014. Heitið "Infotainment" er samanskriving av orðunum information og entertainment. Tað verður brúkt í miðlaheiminum fyri sendingar og heiti, sum partvíst er upplýsing og kunning, og sum partvíst er undirhald ella mentan.

Tær sendingar, sum eru bólkaðar undir Infotainment í kringvarpinum, eru fyrst og fremst

- Góðan Morgun Føroyar,
- Vikuskiftið fríggjadag,
- Also leygardag fyrrapart og
- Surk leygardag seinrapart.

Harafturat eru undir hesum bólki í skrásetingini aðrar sendingar sum frásagnir á ólavsøku o.l. Talan er fyrst og fremst um léttar sendingar, sum taka upp evni, mál, tiltøk, arbeiði og hendingar, ið hava áhuga og týdning, bæði fyri einstaklingin, bólkar, bygdir og samfelag.

Lurtarakanningar vísa, at morgunsendingin hevur nógvar lurtarar, bæði ung og eldri. Fyrsta tíman eru lurtararnir yngru ættarliðini, men sum líður út á morgunin gerast lurtararnir eldri.

rit frá kvf.fo



Við sendingunum Also, Rót og rútmu, og Surk hevur kringvarpið givið lurtarunum eitt gott og lætt tilboð leygardagar, tá fólk ofta taka eina hond í ymiskt fyrifallandi inni og úti, frá kl. 10 til 15.

Børn og ung

# Orrustan var sera góð og kul




Vit løgdu fyri við at senda spurnakappingina - Orrusta. Í fleiri ár hevur verið ætlanina at hava eina spurnakapping fyri børn, tí tað hevur manglað. Endamálið var at hava gott undirhald og samstundis borðreiða við almennari vitan. Slagorðið var eisini: “Børn duga”. Vit hava fingið sera góðar afturmeldingar, ja, at sendingin er góð, kul og at børn og vaksin sita saman í sofuni og gita. Á heysti í 2015 var “casting” til Orrustu 2. Heili 200 børn teknaðu seg. 15 sendingar vóru sendar várhálvuna 2015. Hildið verður fram við Orrustuni í 2016.

## Náttúra og ættarlið í Alt í 1´num

Frá september fram til desember sendu vit Alt í 1´num. 14 sendingar vóru gjørdar, sum vóru pakkaðar við fjølbroyttum undirhaldi við barnaverti. Endamálið var at hava gott tilfar til børn við børnum og samanstundis at samantvinna ættarliðini. Peika á náttúruna og at endurnýta við skili og at gleða ein úr eldra ættlarliðnum. Fyri at gera sendingarnar meira spennandi, vóru vísindamenn við. Stuttlig spøl vóru eisini í sendingini. Tónleikurin í sendingunum er føroyskur.

## Dygdargóðar teknirøðir

Vit hava gjørt nýggjar og dygdargóðar teknirøðir. Lítli prinsurin var gjørdur til heystið í 2015 og Vinarbýurin endaði fyri summarsteðgin. Hvørt mikukvøld er Snipp-Snapp, tá ið børn ymsastaðni í Føroyum eru vertir og siga frá hvørir teknifilmar eru á skrá. Sendingarnar eru gjørdar í náttúruni ella á skúlum og barnagørðum.

## Fjølbroytt barnaútvarp

Barnaútvarpið er fjølbroytt. Vit senda hvønn gerandismorgun, og vit fylgja kalendaranum við serstøkum døgum og tiltøkum. Vit leggja skránna soleiðis til rættis, at vit hava í skiftum fiktión, prát við børn, tónleikasendingar, siðsøguligt o.s.fr. Eitt nú varð nógv gjørt burtur úr sólarmyrkingini í mars mánaða, og evnissendingunum Við Viktoriu, sum var fiktiv, tá ið valið varð útskrivað. Lova mær við, sum er sending, sum børn tekna seg til, og Vit fara út á vitjan.

Eisini hava vit varpað ljós á orðblindni og aðrar evnissendingar. Fleiri ljóðmyndir hava verið gjørdar - eitt nú Og Mamma! og Skúlating stinka. Nýggjar sendingar við teimum í Mórugøtu vórðu sendar á vári 2015. Tað er vælumtókti útvarpsleikurin, sum Jákup Weyhe skrivar og spælir. Somuleiðis var jólakalendarin keyptur frá Jákupi Weyhe - útvarpsleikurin “Jólabandið” í 18 pørtum.

## Barna-heimasíðan VIT

Í oktober kom nógv saknaða heimasíðan til børn á skýggjan. Heimasíðan Vit við Kuldakrákuni, sum maskotti, kom sum vantandi barnatilboð, vit leingi hava bíðað eftir. Síðan er fyrst og fremst gjørd til at pakka sendingarnar flott inn, samstundis sum øll høvdu lætt við at finna sendingarnar aftur. Við heimasíðuni peika vit eisini á eitt fjølbroytt savn við leikum, evnissendingum, framhaldssøgum og tónleiki. Endamálið við síðuni er eisini at undirhalda við søgum, tíðindum, myndum, filmsbrotum og spølum. Tað ber til at tekna seg til sendingar, hoyra søgur um Kuldakrákuna, prenta myndir út við henni og lita og mangt annað.




Avrit frá kvf.fo



## Røddin hjá teimum ungu

Røddin sá dagsins ljós í 2013 og er ment støðugt. Røddin er tilboðið hjá Kringvarpi Føroya fyri tey ungu – men sanniliga eisini saman við teimum ungu. Yvirskipaða ætlanin við Røddini er at fáa fatur á teimum ungu og venja tey at brúka miðlar og vera við til at skapa miðlaarbeiði.

Røddin var í fyrstu atløgu ein heimasíða, sum ung fólk skriva, gera video-klipp og sjálvi redigera. Tó er altíð eitt redaksjonelt starvsfólk hjá kringvarpinum knýtt at Røddini sum vegleiðari. Við hesum møguleikanum fáa ungir føroyingar høvi at royna síni skapandi evni at skriva um ung fyri ung. Tað veri seg tíðindagreinar, hugleiðingar, yrkingar, stuttsøgur og annars royna seg við videotólum.

Røddin hevur í fleiri førum sett dagsskrá í almenna rúminum í Føroyum. Í 2015 fingu starvsfólkini á Røddini frálæru í journalistiskum arbeiði, fjølmiðlaetikki og máli. Fleiri og fleiri vitja Røddina. Í meðal vitja 1900 fólk Røddina um dagin. Tey brúka í meðal ein minutt á Røddini. 45 prosent brúka tendil ella fartelefon. Tilsamans vóru meira enn 690.000 vitjanir á kvf.fo/roddin í 2015.

## Røddin Live

Annað stigið við atliti at heimasíðuni Røddini var útvarpssendingin Reiðrið í 2014. Henda kallast nú Røddin Live. Talan er um eina ungdómssending, sum ung gera. Í henni taka tey ungu upp mál og viðurskifti, sum hevur við tey ungu at gera. Nógv evni hava fingið eina góða og seriøsa viðgerð í Røddini Live í 2015. Vanliga gera tveir unglingar Røddina Live fríggjakvøld kl. 20.

## Mixvarpið

Triða stigið í samstarvinum millum kringvarpið og ungar føroyingar við áhuga fyri miðlum er tónleikasendingin Mixvarpið. Hon er á skrá fríggjakvøld í útvarpinum.

Avrit frá kvf.fo



# Næstan 300 tímar við átrúnaði

KVF sendi nógv meiri átrúnaðarligt tilfar í 2015 enn árið fyri. Í fjør kom tímatalið upp í 282 tímar. Í útvarpinum sendu vit 207 tímar og 75 í sjónvarpinum.

## Liturgisk roynd

Morgunlesturin fekk annan leist tvær vikur í heyst, tá Meinhard Bjartalíð og Bergtórur Hjelm Bjarkhamar løgdu til rættis liturgiskar morgunlestrar.

## Nógv til útiguðstænastu



Eins og undanfarin ár, sendi útvarpið frá útiguðstænastuni, sum var í Gundadali á Hvítusunnu. Sera nógv fólk møttu til hátíðarløtuna.

## Taka sálmar upp

Nógvir sálmar vanta at verða sungnir inn av nýggjum. Fleiri av teimum gomlu eru ikki “sangbarir”. Vit hava skipað fyri “kom og syng sálmar kvøld”, men vit fáa bert 10-12 sálmar hvørt kvøldið. Leif Hansen hevur tí fingið Eystankórið at sungið fleiri sálmar inn. Nýtt sálmabókaískoyti er komið, og har eru sera nógvir sálmar, sum ikki eru í savninum. Arbeitt verður við at skipa fyri einum “sálmamaraton” ein leygardag fyri at fjølga sálmaskattin í kringvarpssavninum.

Avrit frá KVF

## 100 ár í Keypmannahavn

Í samband við at Eliaskirkjan hevði hundrað ára føðingardagsguðstænastu fyri føroyska kirkjuliðinum í Keypmannahavn sendi útvarpið frá hátíðarhaldinum. Keypmannahavnar biskuppur prædikaði, og Føroya biskuppur stóð fyri altartænastuni. Kórið Mpiri sang eittt verk, sum Sunnleif hevur skrivað til høvið yvir eitt sálmaørindi hjá Gudmundi Bruun

## Nýggjársguðstænasta



Kringvarp Føroya skipaði aftur í 2015 fyri nýggjársguðstænastu til sjónvarpið. Hesuferð í Vesturkirkjuni. Theodor E. Olsen prædikaði. Marius Ziska sang lagið Nærveran og kórið Tarira sang. Nógv fólk vóru komin í kirkju og afturmeldingar vóru jaligar.

# KVF framleiddi heimsmeistaraskap

## Hendingaríkt ár

2015 var eitt sera hendingaríkt ár í ítrótti. Til flestu umførini í fremstu fótbóltskappingini hjá monnum var frásøgn í útvarpinum, og útvarpið segði eisini frá FM-finalunum í flogbólti og hondbólti. HM var í estetiskum fimleiki og sendi KvF beinleiðis sjónvarp frá bæði FM og HM í fimleiki. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir allar tær stóru sjónvarps-framleiðslurnar í 2015.

## Oyggjaleikir

Ein tann største ítróttarhendingin í 2015 vóru Oyggjaleikirnir, sum hesuferð vóru á Yersey. Kringvarpið hevði seks fólk á staðnum og størsti denturin var lagdur á at framleiða til útvarp og heimasíðu. M.a. varð fyri fyrstu ferð stroymað frá bæði svimjing og flogbólti.



## HM í svimjing

Kringvarpið var eisini til staðar við einum myndafólki, tá  Pál Joensen luttók í heimsmeistarakappingini í svimjing í Russlandi. Innsløg vórðu gjørd og svimjikappingarnar vórðu keyptar frá altjóða útbjóðara og vístar í sjónvarpinum.

## Ikki til útidystir

Kringvarpið hevur ikki verið til útidystirnar hjá A-landsliðnum í fótbólti, men teir eru vístir í sjónvarpinum. Føroyar spældu fýra EM-undankappingardystir á útivølli í 2015.

## Fara at stroyma meira

Nýggj tøkni hevur við sær, at 2016 kann gerast eitt spennandi ár við ítróttarsendingum, tí tað er nú munandi lættari og bíligari at stroyma beinleiðis sjónvarp á internetinum. Kringvarpið er farið at stroyma hondbólt, og eftir ætlan verður tað sama gjørt við aðrar ítróttargreinar. Í løtuni er talan um sera einfaldar sendingar við einum kamera og einum frásøgufólki.

**Beinleiðis ítróttarframleiðslur í 2015**

07-02-2015 Steypafinalur í hondbólti (sjónvarp)
14-02-2015 Steypafinalur í flogbólti (sjónvarp)
29-03-2015 A-landsdystur: Rumenia – Føroyar (sv_studio í Sortudíki)
11-04-2015 Stóri FM dagurin badminton, borðtennis og judo (sjónvarp)
14-05-2015 FM í svimjing. Dagur 1 (sjónvarp)
15-05-2015 FM í svimjing. Dagur 2 (sjónvarp)
16-05-2015 FM í svimjing. Dagur 3 (sjónvarp)
30-05-2015 FM í fimleiki (2. Hvítusunnudagur) (sjónvarp)
06-06-2015 FM í kappróðri á norðoyastevnu (net og útvarp)
06-06-2015 HM í estetiskum fimleiki. Dagur 1 (sjónvarp)
07-06-2015 HM í estetiskum fimleiki. Dagur 2 (sjónvarp)
13-06-2015 FM í kappróðri í Kollafirði (net og útvarp)
13-06-2015 A-landsdystur: Føroyar – Grikkaland (útvarp og sjónvarp)
20-06-2015 FM kappróður á Strondum (net og útvarp)
27-06-2015 FM kappróður á Tvøroyri (net og útvarp)
27-06 til 03-07-2015 Oyggjaleikir á Jersey (útvarp, sjónvarp og internet)
04-07-2015 FM kappróður í Fuglafirði (net og útvarp)
11-07-2015 FM kappróður í Sandavági (net og útvarp)
28-07-2015 FM kappróður á ólavsøku (net og útvarp)
04-09-2015 A-landsdystur: Føroyar – Norðurírland (útvarp og sjónvarp)
08-10-2015 A-landsdystur: Ungarn – Føroyar (sv_studio í Sortudíki)
11-10-2015 A-landsdystur: Føroyar – Rumenia (útvarp og sjónvarp)

# 1000 fólk vitjaðu KvF mentanarnáttina

Tilsamans vitjaðu eini 1000 fólk í Sortudíki mentanarnáttina. Serliga var stórur áhugi fyri Mórugøtu og Morgunkórinum. Fyri aðru ferð var Kringvarp Føroya ein partur í Mentanarnáttini í Tórshavnar kommunu í 2015. Útvarpið sendi frá tí, sum vit sendu í Sortudíki, og harafturat høvdu vit fólk í býnum. Tey vitjaðu tiltøk og tosaðu við fólk á gøtuni.

## 300 til Mórugøtu

Kringvarpið lat dyrnar upp klokkan hálvgum fimm, tá Jákup Weyhe framførdi ein nýskrivaðan part av Mórugøtu “live”. Nógv fleiri børn vildu sleppa at hoyra Katju, Kenneth og Jón, enn Kringvarpið hevði droymt um. Eini 300-350 børn og vaksin sótu og stóðu sum sild í tunnu í Kringvarpshøllini, tá Jákup spældi leiklutirnar hjá teimum í Mórugøtu.

## Gekkurin dró fólk

Ein hálvan tíma seinri høvdu tey vitjandi høvi at eygleiða tíðindafólkini, tá tey løgdu síðstu hond á útvarpstíðindini og Dag og Viku. Somuleiðis høvdu fólk høvi at vera hjástødd, tá útvarpstíðindini og Dagur og Vika vórðu send. Serliga var stórur áhugi at sleppa inn í Studio 2, tá Gekkurin varð drigin. Nøkur sluppu inn í senn og bíðiraðið varð langt.

## Konsertir við kendum nøvnum



Samstundis vóru konsertir í Kringvarpshøllini, har góð “føroysk nøvn” sungu og spældu. Tey vóru Konni Kass, Guðrið Hansdóttir og Sakaris. Um 250 fólk lurtaðu í kringvarpshøllini eftir føroysku tónleikarunum tilsamans.

## Fólk tyrptust um Morgunkórið

Tá Morgunkórið skuldi upp í trappurnar í forhøllini, var ikki meira enn at sangararnir, sum komu úr øllum landinum, sluppu framat. Ein leyslig teljing vísti, at eini 350-400 fólk vóru komin at lýða á Morgunkórið, sum Morgunsendingin í útvarpinum tók stig til saman við Sigrid Sivertsen.

## Myndir og SavnsGull

Í gongini var høvi at síggja myndirnar, sum vunnu myndakappingina í Morgunsendingini, GMF, og í kjallaranum bar til at síggja gomul bond og skjøl. Starvsfólk í SavnsGulli vístu teimum áhugaðu, hvussu bond og tíðindaskjøl verða talgild. Á stórskýggjað var høvi hjá vitjandi at síggja politikkarar siga sína hugsan um ávísar sendingar, sum teir minstust serliga væl í stóra og virðismikla savni kringvarpsins.




Avrit frá kvf.fo

# 21 flokkar og bólkar vitjaðu

Nógvir flokkar vitja hvørt ár Kringvarp Føroya. Serliga er talan um skúlaflokkar á bygd, sum eru á náms- ella kunningarferð í høvuðsstaðnum. Í 2015 vitjaðu 21 flokkar í kringvarpinum. Harafturat vitjaðu bókar við næmingum frá Fróðskaparsetrinum og miðnámsskúlum. Ynski hjá næmingum er ofta at síggja, hvussu sjónvarp og útvarp verður gjørt, og hvussu stovnurin annars sær út.

## Skulu hyggja og lurta undan vitjan

Fyri at báðir partar skulu fáa meira burturúr, hevur Kringvarpið í samráð við lærarar biðið næmingar hyggja at ávísum føroyskum sendingum í sjónvarpinum, ella lurta eftir sendingum í útvarpinum, t.d. ungdómssendingini Røddini. Í summum førum eru tey biðin um at koma við greiningum ella siga sína hugsan. Á henda hátt hava næmingarnir verið noyddir at hyggja ella lurta og gera sær sínar tankar um tað, sum gjørt og sent verður í Kringvarpinum. Hetta hevur givið bæði næmingum og Kringvarpinum nakað.

## Tosa við tey "kendu"

Sjálvandi er tað eisini fragd hjá næingunum at spyrja og tosa við journalistarnar, sum gera ymisku sendingarnar ella skriva tíðindi.

## Námsdagur fyri lesandi

Harafturat fyrireikaði Kringvarpið á øðrum sinni í 2015 ein námsdag fyri lesandi á Fróðskaparsetrinum í lærugreinini miðlar. Ein slíkan dag greiða journalistar frá arbeiðið sínum – bæði um arbeiðshátt, útbúgvingar, innihald, avbjóðingar at gera djúptøknar sendingar o.s.fr. – og tey lesandi hava høvi at spyrja. Á henda hátt kann kringvarpið og starvsfólkini í stovninum lata nakað av síni vitan og royndir til tey lesandi.
Eisini skipaði kringvarpið fyri einum hálvum evnisdegi fyri einum miðnámsflokki.

## Eisini pensjónistar

Stundum vitja pensjónistafeløg ella áhugafeløg kringvarpið á ferð í høvuðsstaðnum. Í fjør vitjaði ein føroyskur bólkur við pensjónistum Kringvarpið. Øll føroysk húski fíggja Kringvarp Føroya og tí miða vit eftir at taka væl ímóti flokkum, bólkum og einstaklingum, sum hava hug at vitja kringvarpið.

Avrit frá kvf.fo





# Stórur kvæðaupptøkudagur í Reinsarínum

Í 2015 skipaði Kringvarpið fyri fyrstuferð fyri einum stórum upptøkudegi við fleiri dansifeløgum. Talan var upptøkur til sjónvarp, og tikið varð upp í Reinsarínum í Tórsgøtu. Tiltakið eydnaðist sera væl og tilsamans kvóðu feløgini 12 kvæði, tættir og vísur.

Bæði Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya hava, síðani tey vórðu stovnað, tikið upp føroyskan dans kring landið. Hetta varð sjálvandi gjørt fyri at hava sendingar við føroyskum dansi, men í fyrstu útvarpstíðini løgdu stjórarnir eisini dent á at fáa ymisk frábrigdi í dansi- og kvøðingarlagi á band. Tí eru nógvar av gomlu upptøkunum bara nakrar minuttir og ikki heil kvæði.

Seinastu árini hevur verið avmarkað, hvussu nógv er tikið upp. Serliga til sjónvarp, tí tað er rættiliga dýrt at fara kring landið. Ístaðin avráddu Sláið Ring – meginfelagið hjá dansifeløgunum – og kringvarpið á heysti í 2014 at skipa fyri einum størri dansitiltaki í Havn í januar í 2015.

(Tiltakað eydnaðist stak væl, og dansifeløg hildu, at tiltakið skuldi roynast aftur. Tí varð aftur í januar 2016 skipað fyri upptøkudegi í Reinsarínum. Seks feløg vóru sinnað at vera við, og tilsamans tók Kringvarpið upp 14 kvæði, vísur og tættir til sjónvarp. Millum feløgini vóru eisini Ung í Dansi, sum er nýtt felag í Sláið Ring).

Kringvarpið og Sláið Ring miða eftir at fáa upptøkur við kvæðum, sum kringvarpið annaðhvørt ikki hevur, ella sum kringvarpið bara hevur við minni góðari goðsku. Sláið Ring og krinvarpið ætla at skipa fyri nýggjum upptøkudegi í 2017. Tá verður miðað eftir at fáa feløg, sum kringvarpið ikki hevur sjónvarpsuppptøkur við, at dansa og kvøða. Upptøkurdagurin verður eisini liður í at varpa ljós á, at 6. februar komandi ár eru 60 ár liðin síðani Útvarp Føroya varð sett á stovn.

Tilsamans hevur Kringvarpið um 450 kvæðaupptøkur til útvarp. Í dansitíðini – frá september – og til føstuinngang – hevði útvarpið sendingina Dansival. Í henni fingu fólk kring landið høvi at ynskja sær eitt ella fleiri kvæði, eins og siga okkurt um dans og kvøðing á staðnum.

Avrit frá kvf.fo

# Á heysti í 16 verður meiri arbeiðsligt í KvF

Farið varð at byggja upp í kringvarpshúsini norðan fyri á vári í 2015. Eftir ætlan skuldi arbeiðið verður liðugt á heysti, men arbeiðið at byggja upp í var ikki liðugt, tá farið varð inn í 2016. Talan er um fyrsta part av fyrsta byggistigi. Í nýggja bygninginum norðureftir verður eitt sendistudio, fleiri rúm at redigera sjónvarp í, og harafturat er “no break”-útbúnaðurin og “krossfeltið” í kjallarahæddini.

Í 2014 fluttu tey seinastu starvsfólkini úr Vørsluni niðan í Sortudíki. Tá vóru ymiskar tillagingar gjørdar í gomlu útvarpshúsunum, soleiðis at tey 80 starvsfólkini fingu síni arbeiðspláss. Fyri at hýsa redigeringseindum o.ø. til sjónvarp, vórðu fýra arbeiðsskúrar leigaðir at seta á p-økið norðanfyri. Hesir verða fluttir, tá nýggi bygningurin er tikin í brúk, væntandi á vári í 2016.

Annar parturin í hesum byggistignum er umsitingarbygningur og forhøll, sum verða bygd sunnanfyri kringvarpshúsini. Eftir ætlanini skal hetta arbeiðið verða liðugt í oktober 2016.

Umsiting og stjóraskrivstova er í ovaru hædd í høvuðsbygninginum. Somuleiðis er tað lítla matarhøli á hesi hæddini. Eftir ætlanini skal deildin Mentan húsast í hesi hæddini, tá umsitingin er flutt í nýggja bygningin frammanfyri. Matarhølið, køkur og matborð, verður innrættað í tí partinum í Kringvarpshúsunum, sum útvarpið bygdi uppí miðskeiðis í 1990-árunum.

Tilsamans fer arbeiðið at byggja út norðan- og sunnanfyri at kosta stívliga 22 mill.kr.

Avrit frá kvf.fo



# Orðaskvaldur og persónligar rættingar

*"Kringvarpið eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum, og hevur skyldu at tryggja stravs-fólkunum holla málsliga ráðgeving", verður sagt í lógini um Kringvarp Føroya.*

Eisini gamli public service-sáttmálin hevur eina áseting um málið:

***"Kringvarp Føroya skal hava ein virknan málpolitikk, ið skal virka fyri at menna føroyska málið. soleiðis at brúkarin upplivir rætt og lætt skilligt mál, ið er livandi í almenna rúminum. Aðalmálið er, at allar sendingar, ið Kringvarp Føroya framleiðir, eru á góðum føroyskum máli"*** (úr Public service-sáttmálanum).

Grundað á hesar ásetingar gjørdi Kringvarp Føroya og Sonne Smith, journalistur, í 2013 eina avtalu um málsliga ráðgeving. Sonne Smith er løntur upp í 15 tímar um vikuna. Hann lurtar eftir tíðindum og sendingum og hevur høvi at síggja tekstir. Grundað á hetta arbeiðið vegleiðir hann fólki persónliga. Eisini sendir hann regluliga út inn-anhýsis skrivið Orðaskvaldur. Í tí tekur hann upp dømi um skeivt og rætt málbrúk.



rit frá kvf.fo

# Fáar klagur men nógvar viðmerkingar

Fyri at lúka skylduna í gamla public service-sáttmálanum um “samskifti við borgaran” hevur kringvarpið á heimasíðuni teigin “Rós og rís”. Tað merkir, at hyggjarar, lurtarar og lesarar hava høvi at klaga um tænastuna hjá kringvarpinum ella koma við rósandi orðum.

Kringvarpið fekk í 2015 umleið 100 atfinningar, spurningar, uppskot, rósandi orð í “rís og rós”-teiginum. Viðhvørt er talan um viðmerkingar til tíðindi ella sendingar, og viðhvørt koma spurningar um, hví onkur sending ikki er komin á heimasíðna. Eisini koma fráboðanir um ring hoyrilíkindi og onnur tøknilig brek.

## Miða eftir at svara

Tað, sum kemur til “Rós og rís” verður beint til tann rætta persónin ella ta røttu deildina. Er talan um veruligar klagur ella viðmerkingar, fáa tey, sum hava gjørt vart við seg eitt svar. Er talan um tøkniligar spurningar o.l. verður slíkt rættað ella bøtt um skjótast gjørligt.

## Summi ringja

Tað hendir seg eisini, at fólk ringja, um tey hava eina viðmerking ella hava hug at finnast at onkrum. Flestu viðmerkingarnar eru um føroyska málið, brek við sendara ella streyming, um skránna og tónleikavalið, sum teimum kanska ikki dáma. Talan var um færri enn 15 slíkar viðmerkingar í 2015.

## Umleið 100 facebook-boð

Á Facebook hava tey, sum brúka tænastur hjá kringvarpinum eisini høvi at gera vart við seg. Umleið 100 boð komu inn í 2015. Klagur koma sjálvdan umvegis síðuna. Er talan um eina beinleiðis klagu, vísir facebook-umsitarin á møguleikan at seta seg í samband við deildarleiðararnar ella stjóran fyri at vita, um málið ikki kann loysast í semju.

Í øðrum lagi verða kunnað fólk um, at tey kunnu kæra til Fjølmiðlakærunevndina, kenna tey seg (ella onkur avvarðandi) órættvíst viðfarin í kringvarpinum.

Viðmerkingarnar snúgva seg serliga um:

- Tøkni, ið ikki riggar
- Heimasíðu og sendinetini hjá útvarpinum og sjónvarpinum
- Tíðindaflutningin
- Innihaldið í sendingum, sum kringvarpið hevur gjørt
- Hvar fólk finna tilfar á netinum, sum hevur verið sent í útvarpi ella sjónvarpi
- Hvussu fólk kunnu keypa sendingar
- Raðfestingar í sjónvarpsskránni

Øll fólk, sum skriva persónlig boð, fáa svar. Er tað “bara” viðmerkingar takkar umsitarin fyri, og sendir boðini víðari til røttu fólkini í húsinum. Hava fólk spurningar, verða tey beind til tey røttu fólkini í Kringvarpinum. Eingin, ið skrivar, verður sleptur upp á fjall.

Svartíðin er vanliga nakrir fáir tímar, undantikið sunnudagar og frídagar.

## Samskifti í sendingum

Á tíðindapallunum, útvarp og heimasíða, hevur kringvarpið rættiliga nógv samskifti við borgaran. Í sendingunum Vikuskiftið, Also, Surk og morgunsendingini GMF hava lurtarar høvi at senda inn sms ella á annan hátt gera vart við seg. Heilt nógvir lurtarar nýta hetta høvið. Sendingin Surk byggir í stóran mun á tað, sum lurtarar upplýsa um og takast við. Á heimasíðuni er “Rós og rís” møguleikin hjá hyggjarum og lurtarum at gera vart við seg.

Avrit frá kvf.fo

# Menna heimasíðuna kvf.fo

Í 2015 gjørdi ein innanhýsis arbeiðsbólkur uppskot um eina arbeiðsætlan at menna heimasíðuna hjá kringvarpinum. Arbeiðið er sett í verk og verður fyrsta stigið liðugt í 2016.

Alsamt fleiri lesa og lurta eftir tíðindum og sending á heimasíðum og portalum. Kvf.fo hevur nógvar vitjanir, men leiðslan hevur sett sær fyri at betra um heimasíðuna. Setningurin er, at tað skal vera lættari at brúka kvf.fo og tað skal ikki vera so torført at finna fram tilfar, sum liggur á kvf.fo

Samaumtikið er ætlanin at kvf.fo skal vera betri, meira virkin og lættari at brúka.

Kvf.fo, við undirsíðum, hevur í miðal 140.000 vitjandi mánaðarliga, og hesi vitja í miðal 3,4 síður hvørja ferð.

kvf.fo



# Keypa sendingar og vanligar tænastur

Starvsfólkatalið í Kringvarpi Føroya er lækkað nógv tey seinastu árini og fríyrkisfólk gera tí fleiri sendingar fyri kringvarpið. Harafturat verða sendingar keyptar frá fríyrkisfólki.

Á tónleikaøkinum hevur kringvarpið fastar avtalur við nakrar tónleikarar um at gera sendingar, eitt nú Bolero, Rót og rútmu, Jazzofonina og Harmonikuløtuna.



Sum nevnt undir kapitlinum um virksemið hjá deildini Mentan keypti sendirøðina Spískamarið í seks pørtum og tvær sendingar við heitinum ST hjálpin. Í samastarvi við ein áhugabólk í Hvalba gjørdu miðlafólk og starvsfólk í kringvarpinum eina sending um kolavinnuna í Hvalba, eins og eina sending um Lítlu Dímun, sum vóru vístar í sjónvarpinum.



Eisini vórðu nakrar sendingar keyptar til útvarp.

Harafturat veita privat vinnurekandi kringvarpinum tænastur. Talan er um telefon og vaktarhald, reingerð, matarskipan, grannskoðan og løgfrøði.

Deildin Aktuelt keypir ikki inn sendingar skipað, men deildin nýtir dagliga fríyrkisfólk í tíðindaflutninginum, bæði heima og uttanlands.

# Partur í tilbúgvingini

Kringvarpið er partur í Tilbúgvingarskipan Landsins, sum hevur telefonnummur hjá lyklapersónum í kringvarpinum. Tað merkir, at kringvarpið kann eftir eini lítlari løtu vera við, um eitt ella annað álvarsamt hendir.

# Førleikamenning

Trý starvsfólk á Aktuelt vóru á vetri 2015 á redaktørskeiði í Keypmannahavn. Talan var um tvey skeiðsumfør. Fyrra í januar, seinna í februar. Redaktørskeiðini góvu redaktørunum góð amboð til redaktiónsleiðslu. Í september skipaði kringvarpið fyri skeiði í søguforteljing. Vit fingu Torben Schou frá Danmarks Radio til at hava skeiðið, sum fevndi um tveir skeiðsdagar. 12 luttakarar vóru á skeiðnum frá øllum húsinum.

Kringvarp Føroya miðar støðugt eftir at geva starvsfólkum møguleikar at fara á skeið innan journalistik ella onnur redaksjonell viðurskifti. Hesin møguleikin hevur tó verið avmarkaður, tí tað hevur verið trongt fíggjarliga. Eingin tøkningur var á skeiði í 2015, men tá útlendingar hava umvælt útgerð ella sett útgerð upp í kringvarpinum, hava teir eisini førleikament tøkningar. Í onkrum føri hava tøkningar fingið førleikamenning umvegis skypa-samskifti.

# Tøknin er krevjandi

Tøknin er sera krevjandi í sjónvarps- og útvarpsmiðling. Størstu íløgurnar hjá Krinvarpi Føroya fara vanlig ár til at endurnýggja tøkni ella taka nýggja tøkni í brúk. Fíggjarliga trongstøðan hjá Kringvarpinum fyri nøkrum árum síðani hevði við sær, at peningur var ikki at gera í løgur í tøkniliga útgerð, sum annaðhvørt var slitin ella í nýggja tøkni.

Seinastu árini hevur verði arbeitt áhaldandi við at  skifta og einfaldgera tann tøkniliga partin við nýggja KT-tøkni. Nógv gomul og tung útgerð er skift, men enn er langt eftir á mál. M.a. verður arbeitt við at kunna senda í HD góðsku, og er øll nýggj útgerð, sum eru útvegað seinastu árini, ætlað til HD.

Í 2015 varð soleiðis arbeitt við at útvega HD-myndatól í 2016. Somuleiðis arbeiddi leiðslan á deildini Tøkni við at endurnýggja ein útvarpssendibil. Hann skal byggjast um í Danmark, soleiðis at kann senda bæði sjónvarp og útvarp. Miðað verður eftir, at sendast skal frá bilinum við fáum fólkum – heilt niður til eittans fólk. Henda íløgan fer at lætta munandi um hjá Kringvarp Føroya at koma skjótt út til ymiskar framleiðslur.

Avrit frá kvf.fo

# KT-tungur stovnur

KvF er ein sera ”KT-tungur” stovnur. Hetta merkir, at næstan allar mannagondgir – líkamikið hvørjum øki tú hyggur at – eru sera tætt knýttar at KT. Miðlarnir, ið KvF arbeiðir við, eru allir talgildir, og tørvurin til stórar dátugoymslur er sera stórur og alsamt vaksandi. Harfaturat kemur, at dátamongdirnar eru slíkar, at tað er óhugsandi at brúka tænastur uttanfyri húsið til hetta (ofta nevnt Cloud og/ella Hýsing).

Sum dømi kan nevnast, at fyri at flyta framleiðslutilfar millum ambætarar og arbeiðsstøðir, krevst í minsta lagi 10Gb samband – t.e. 10 ferðir so nógv sum á einum nútímans lokalneti, og 200-300 ferðir meira enn tað, sum skjótastu internet-hald orka í dag.

Hetta merkir aftur, at útgerð til undirstøðukervi, so sum net og goymsla, skal keypast inn og standa í húsinum. Harafturat skulu allir komponentar í undirstøðukervinum arbeiða við høgari ferð, sum aftur merkir, at undirstøðukervið er nógv dýrari enn hjá øðrum stovnum. Tað er sjónvarp, ið krevur mesta partin av goymlsu- og net-kapasiteti. Eftir ætlan fer Kringvarp Føroya gera tilfar og senda í HD-góðsku í næstum, og tá fer tørvurin at vaksa upp aftur meira.

## Bygnaðurin




# Fýra deildir

Kringvarp Føroya hevur einfaldan bygnað. Bygnaðurin varð umskipaður fyrst í 2013 og talið á deildum lækkað í fýra deildir:

Aktuelt – tíðindini og aktualitetssendingar
Mentan – sendingar, skrá og teksting
Tøkni – upptøkur til ljóð og film, sendiútgerð, studiosending, sendingaredigering og KT
Umsiting – fíggjarstýring, bókhald, lønir, samsýningar, spøl, savn og hús

# Kringvarpsstýrið er ovasta leiðslan á stovninum

Kringvarp Føroya er undir Mentamálaráðnum. Millum Kringvarp Føroya og aðalráðið er eitt stýri við sjey limum. Hetta er gjørt fyri at tryggja tað, sum nevnt verður "armslongdarprinsippið".

Stýrið hevur ábyrgdina av, at Kringvarp Føroya virkar eftir ásetingunum í Kringvarpslógini og í øðrum fyriskipanum um virksemi á stovninum.

Teir fýra stóru flokkarnir á løgtingið velja hvør sín lim, landsstýrismaðurin velur tveir limir, og starvsfólkini velja ein lim í stýrið fyri Kringvarp Føroya. Landsstýrismaðurin ger av, hvør er formaður og næstformaður í stýrinum.

Eftir tilmæli stjórans staðfestir stýrið virksemi stovnsins sum heild og yvirskipaðu meginreglurnar fyri programmpolitikkin í fíggjarárinum, eins og stýrið skal góðkenna og hava eftirlit við stovnsins rakstrarætlan og roknskapi.

Stjórin ger uppskot til stovnsbygnað, sum stýrið staðfestir, tó so at tað til eina og hvørja tíð skulu vera tvær tíðindaredaksjónir.

Formaður í stýrium fyri Kringvarp Føroya er Rúni Heinesen. Næstformaður er Hjalmar Hansen. Limir í stýrinum eru Gunvá við Keldu, Aibritt á Plógv, Katrin Petersen, Theodor E. D. Olsen og Kári Sólstein, sum umboðar starvsfólkini í Kringvarpi Føroya.

Stýrið fyri Kringvarp Føroya verður valt í eitt fýra ára tíðarskeið. Sitandi stýrið tók við 1. januar 2015 og situr til 31. desember 2018.

Avrit frá kvf.fo

# Rakstrarroknskapur 2015, Kringvarp Føroya

**KRINGVARP FØROYA**

| Nota | | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| 2 | Inntøkur | 57.914.291 | 64.176.511 |
| 3 | Framleiðandi deildir | -33.224.146 | -30.017.779 |
| 4 | Stuðlandi deildir | -18.945.521 | -19.564.114 |
| 5 | Annar kostnaður | -4.005.986 | -3.476.679 |
| | **Úrslit áðrenn rentur, avskrivingar og íløgur** | **1.738.638** | **11.117.939** |
| | | | |
| | Íløgur og størri viðlíkahald | -3.367.134 | -3.722.140 |
| | Avskrivingar og avsetingar av skuldarum | -695.779 | -399.668 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **-2.324.275** | **6.996.131** |
| | | | |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 6.442 | 54.802 |
| | Aðrir fíggarligir kostnaðir | -6.141 | -6.830 |
| | **Úrslit áðrenn støðling av avlopi** | **-2.323.974** | **7.044.103** |
| | | | |
| | Støðlað avlop frá eydnuspølum | 0 | -7.044.103 |
| | Afturført støðlað avlop frá 2014 | 2.323.974 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **0** | **0** |

Avrit frá kvf.fo

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2015, Kringvarp Føroya

**KRINGVARP FØROYA**

| Nota | **OGN** | **2015** | **2014** |
|---|---|---|---|
| | Grundøki | 3.183.768 | 3.183.768 |
| | Bygningur | 13.243.168 | 13.243.168 |
| | Akfør | 131.236 | 313.517 |
| | **Materiel støðisogn til samans** | **16.558.172** | **16.740.453** |
| | | | |
| | Millumrokning við Gjaldstovuna | 3.321.469 | 0 |
| 6 | Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar | 2.380.672 | 1.992.901 |
| 7 | Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald | 3.262.178 | 2.633.013 |
| 8 | Onnur áogn | 693.988 | 367.978 |
| | **Áogn til samans** | **9.658.307** | **4.993.892** |
| | | | |
| 9 | Tøkur peningur | 919.131 | 22.817.899 |
| | **Ogn í umferð til samans** | **10.577.438** | **27.811.791** |
| | | | |
| | **Ogn til samans** | **27.135.610** | **44.552.244** |

Avrit frá kvf.fo

| **SKYLDUR** | **2015** | **2014** |
|---|---|---|
| Eginogn við ársbyrjan | -4.340.040 | -4.340.040 |
| Mótkonta, bygningur | 13.243.168 | 13.243.168 |
| Mótkonta, onnur materiel støðisogn | 3.315.004 | 3.497.285 |
| Mótkonta, upphædd á StRk. 0360 | 4.340.040 | 4.340.040 |
| Ársúrslit áðrenn støðling | -2.323.974 | 7.044.103 |
| Flutt til/frá Strk. 0881 | 2.323.974 | -7.044.103 |
| **Eginogn til samans** | **16.558.172** | **16.740.453** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Stuttfreistað skuld** | | |
| | Millumrokning við Gjaldstovuna | 0 | 17.752.999 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 0 | 0 |
| 10 | Onnur skuld | 4.424.195 | 3.014.689 |
| 11 | Fremmand fígging | 6.153.243 | 7.044.103 |
| | **Stuttfreistað skuld til samans** | **10.577.438** | **27.811.791** |
| | **Skyldur til samans** | **27.135.610** | **44.552.244** |

Týðandi roknskaparligar óvissur og viðurskifti (nota 1)

Ognir, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni (nota 12)

Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni (nota 13)

Avrit frá kvf.fo

# Notur

1 **Týðandi roknskaparligar óvissur og viðurskifti**

**Inntøkugrundarlagið viðvíkjandi kringvarpsgjaldi**

Til 1. januar 2016 hevur Kringvarp Føroya havt skyldu at gera og dagføra eina skrá við neyðugum upplýsingum um húski, arbeiðspláss og høli, sum koma undir gjaldskyldu. Eingin av almennu skráunum yvir húski, arbeiðspláss o.a. innihalda allar tær upplýsingar, sum Kringvarp Føroya hevur havt tørv á fyri at krevja kringvarpsgjaldið rætt inn frá øllum.

Kringvarpsgjaldið hevur tí verið tungt at umsita. Nógv tíð er farin til at útvega neyðugar upplýsingar fyri at gera av, um borgarar ella virkir høvdu gjaldskyldu. Talan hevur verið um upplýsingar frá bæði borgarum og myndugleikum, og mangan skuldu ítøkiligar metingar gerast.

Við einari ófullfíggjaðari skrá hevur óvissa valdað um veruliga inntøkugrundarlagið hjá Kringvarpi Føroya. Óvissan valdaði framvegis í 2015, tó batnaðu viðurskiftini munandi, tá ið umsitingin seint á heysti 2015 fekk atgongd til skránna hjá Landsfólkayvirlitinum.

Eftir 1. januar 2016 er skipanin við kringvarpsgjaldinum avgerandi broytt. Gjaldskyldan er tengd at persónum, virkjum, stovnum v.m., og TAKS krevur kringvarpsgjaldið inn vegna Kringvarp Føroya.

Avrit frá kvf.fo

## *Notur*

| 2 | **Inntøkur** | **2015** | **2014** |
|---|---|---|---|
| | Kringvarpsgjald | 48.197.148 | 47.078.366 |
| | Útvarpskunngerðir og –lýsingar | 4.840.400 | 4.706.652 |
| | Sjónvarpslýsingar og ískoytisveitingar | 1.459.398 | 1.163.647 |
| | V4-spælið, netto | 202.518 | 374.914 |
| | Gekkaspælið, netto | 2.954.734 | 10.227.414 |
| | Aðrar inntøkur | 260.093 | 625.518 |
| | **Inntøkur til samans** | **57.914.291** | **64.176.511** |

| **V4-spælið, netto** | **2015** | **2014** |
|---|---|---|
| Inntøkur | 527.325 | 859.392 |
| Lønir, samsýningar og lønartengdar útreiðslur | -175.954 | -179.154 |
| Aðrar útreiðslur | -148.853 | -305.324 |
| **V4-spælið, tikið við sum rakstrarinntøka í árinum** | **202.518** | **374.914** |

| **Gekkaspælið, netto** | **2015** | **2014** |
|---|---|---|
| Inntøkur | 10.525.440 | 19.143.840 |
| Lønir, samsýningar og lønartengdar útreiðslur | -446.735 | -425.547 |
| Aðrar útreiðslur | -5.690.857 | -8.490.879 |
| **Nettoúrslit í árinum** | **4.387.848** | **10.227.414** |
| Partur av inntøku í árinum, sum er støðlað á kontu fyri fremmandari fígging | -1.433.114 | 0 |
| **Gekkaspælið, tikið við sum rakstrarinntøka í árinum** | **2.954.743** | **10.227.414** |

Avrit frá kvf.fo

## *Notur*

| 3 | Framleiðandi deildir | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | **Aktuelt/Tíðindadeildin:** | | |
| | Lønir og samsýningar | 10.306.175 | 9.453.451 |
| | Vørur og tænastur | 706.285 | 435.031 |
| | **Aktuelt/Tíðindadeildin til samans** | 11.012.460 | 9.888.482 |
| | **Heimasíða:** | | |
| | Lønir og samsýningar | 991.044 | 907.883 |
| | Vørur og tænastur | 32.700 | 0 |
| | **Heimasíða til samans** | 1.023.744 | 907.883 |
| | **Mentan/Programmdeildin:** | | |
| | Lønir og samsýningar | 10.108.101 | 9.889.492 |
| | Vørur og tænastur | 1.570.797 | 1.138.199 |
| | **Mentan/Programmdeildin til samans** | 11.678.898 | 11.027.691 |
| | **Tøknideildin (framleiðsluparturin):** | | |
| | Lønir og samsýningar | 8.947.592 | 7.656.829 |
| | Vørur og tænastur | 561.452 | 536.894 |
| | **Tøknideildin (framleiðslupartur) til samans** | 9.509.044 | 8.193.723 |
| | **Framleiðandi deildir til samans** | **33.224.146** | **30.017.779** |

Avrit frá kvf.fo

## *Notur*

| 4 | **Stuðlandi deildir** | **2015** | **2014** |
|---|---|---|---|
| | **Umsitingin:** | | |
| | Lønir | 4.797.981 | 4.499.785 |
| | Vørur og tænastur | 2.558.873 | 1.935.479 |
| | Umsitingin til samans | 7.356.854 | 6.435.264 |
| | | | |
| | **Tøkni deildin (ikki framleiðslupartur):** | | |
| | Lønir og samsýningar | 4.715.848 | 5.823.916 |
| | Vørur og tænastur | 2.791.526 | 2.897.207 |
| | Samskiftiskostnaður | 1.042.237 | 1.112.808 |
| | Húsakostnaður | 2.612.668 | 2.840.165 |
| | Rakstur av akførum | 426.388 | 454.754 |
| | Tøkni deildin til samans | 11.588.667 | 13.128.850 |
| | | | |
| | **Stuðlandi deildir til samans** | **18.945.521** | **19.564.114** |

| 5 | **Annar kostnaður** | **2015** | **2014** |
|---|---|---|---|
| | Kostnaður fyri rættindi | 4.005.986 | 3.476.679 |
| | Ískoyti til teknmálstulking | 0 | 0 |
| | **Annar kostnaður til samans** | **4.005.986** | **3.476.679** |

| 6 | **Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar** | **2015** | **2014** |
|---|---|---|---|
| | Áogn, brutto | 3.083.914 | 2.807.627 |
| | Avsett móti væntaðum tapi | -703.242 | -814.726 |
| | **Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar til samans** | **2.380.672** | **1.992.901** |

Avrit frá kvf.fo

## Notur

| 7 | Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | Áogn, brutto | 8.262.178 | 7.333.013 |
| | Avsett móti væntaðum tapi | -5.000.000 | -4.700.000 |
| | **Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald til samans** | **3.262.178** | **2.633.013** |

| 8 | Onnur áogn | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | Meirvirðisgjald | 0 | 214.411 |
| | Depositum | 76.082 | 76.082 |
| | Ferðaforskot | 0 | 58.274 |
| | Tíðaravmarkingar og onnur áogn | 617.906 | 19.211 |
| | **Onnur áogn til samans** | **693.988** | **367.978** |

| 9 | Tøkur peningur | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | BankNordik | 442.087 | 14.506.202 |
| | Eik Banki | 270.269 | 5.008.518 |
| | Norðoya Sparikassi | 18.553 | 1.719.561 |
| | Suðuroyar Sparikassi | 186.177 | 1.581.418 |
| | Kassapeningur | 2.045 | 2.200 |
| | **Tøkur peningur til samans** | **919.131** | **22.817.899** |

| 10 | Onnur skuld | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | Meirvirðisgjald | 173.025 | 0 |
| | Skyldug avspáking | 989.600 | 718.400 |
| | Skyldugt frítíðarískoyti | 331.000 | 313.000 |
| | Skyldur í sambandi við eydnuspøl | 1.943.739 | 1.475.543 |
| | Upphavsrættargrunnur | 109.742 | 87.927 |
| | Tíðaravmarkingar | 877.089 | 419.819 |
| | **Onnur skuld til samans** | **4.424.195** | **3.014.689** |

Avrit frá kvf.fo

# Notur

11

| Fremmand fígging | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Støðlað við ársbyrjan | 7.044.103 | 0 |
| Tilgongd í árinum | 4.590.366 | 7.044.103 |
| Frágongd í árinum | -5.481.226 | 0 |
| **Støðlað/fremmand fígging tilsamans** | **6.153.243** | **7.044.103** |

| Tilgongd í árinum | | |
|---|---|---|
| Inntøkur V4-spælið, netto | 202.518 | 0 |
| Inntøkur gekka-spælið, netto | 4.387.848 | 7.044.103 |
| **Tilgongd tilsamans** | **4.590.366** | **7.044.103** |

| Frágongd í árinum | | | |
|---|---|---|---|
| Flutt til rakstur, restfígging | | 3.157.252 | 0 |
| **Brúkt av avlopi 2014:** | | | |
| Aktuelt og kjak | 750.000 | | 0 |
| Børn og ung | 337.074 | | 0 |
| Undirhald | 282.797 | | 0 |
| Útgerð, tøkni og heimasíða | 420.000 | | 0 |
| Onnur endamál | 534.103 | 2.323.974 | 0 |
| **Frágongd tilsamans** | | **5.481.226** | **0** |

| Sundurgreinaðar saldur | Eydnuspøl 2014 | Eydnuspøl seinni ár | Salda við ársenda 2015 |
|---|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan 2015 | 7.044.103 | 0 | 7.044.103 |
| Tilgongd í 2015 | 0 | 4.590.366 | 4.590.366 |
| Frágongd í 2015 | -2.323.974 | -3.157.252 | -5.481.226 |
| **Salda við ársenda 2015** | **4.720.129** | **1.433.114** | **6.153.243** |

Avrit frá kvf.fo

Inntøkur frá eydnuspølum vórðu á fyrsta sinni støðlaðar sum fremmand fígging í fíggjarárinum 2014. Í roknskapinum fyri 2014 varð støðlaða nettoupphæddin, 7.044 tkr., tikin við sum inntøka í rakstrinum, og flutt á kontuna fyri fremmanda fígging í fíggjarstøðuni sum eitt avlop. Frá og við 2015 verða inntøkur frá eydnuspølum bert inntøkuførdar í rakstrinum í tann mun, tørvur er á tí, sum restfígging. Upphæddin viðvíkjandi 2014, sum longu er inntøkuførd eina ferð, verður afturførd so hvørt, sum brúkt verður av henni, og hon verður skrásett í rakstrinum sum sjálvstøðugur postur áðrenn ársúrslitið.

# *Notur*

12 **Ognir, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuna**

Bygningurin og akfør eru skrásett sum materiell støðisogn í fíggjarstøðuni.

Tilgongdir viðvíkjandi materiellari støðisogn, sum eru førdar yvir raksturin seinastu 4-5 árini, eru ikki tiknar við í fíggjarstøðuna. Tó eru 5,0 mió.kr. viðvíkjandi einari stórari umbygging í 2013 tiknar við í fíggjarstøðuna í ársroknskapinum, men ikki í fíggjarstøðuna í Búskaparskipan Landsins.

Arbeiðið, at gera materiella støðisogn upp, er í gongd. Tá ið uppgerðin er gjørd, verða allar ognir, ið hava virðið omanfyri 75 tkr., tiknar við í fíggjarstøðuna í Búskaparskipan Landsins.

Kringvarp Føroya hevur verið partur í einum sakarmáli. Tveir dómar vórðu sagdir í málinum í 2015. Sambært endaliga dóminum hjá Eystara landsrætti skal mótparturin rinda Kringvarpi Føroya 0,25 mió.kr. fyri sakarmálskostnað. Mótparturin hevur kært tann partin av dóminum, sum snýr seg um endurgjaldsupphæddina, men kærunevndin hevur ikki tikið støðu til kæruna enn. Grundað á óvissu um upphæddina, er endurgjaldsupphæddin ikki tikin við í fíggjarstøðuna, sum ein áogn.

13 **Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuna**

Skyldug restferia frá innvinningarárinum 2014/2015 er við árslok 2015 gjørd upp til 0,8 mió.kr. (2013/2014: 0,6 mió.kr.).

Harumframt hava starvsfólk í roknskaparárinum 2015 vunnið rætt til feriu at halda í frítíðarárinum 2016/2017. Av hesari skyldu eru 0,3 mió.kr. tiknar við í fíggjarstøðuna, svarandi til skyldugt frítíðarískoyti, ið er innvunnið í tíðarskeiðinum 1. apríl – 31. desember 2015.

Avrit frá kvf.fo

Avrit frá kvf.fo

KRINGVARP FØROYA